Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Hans Jacob Thomsen, løgtingsmaður

Svarari: Djóni Nolsøe Joensen, landsstýrismaður í barna- og undirvísingarmálum

Evni: Avsláttur í ferðaseðlaprísum til lærlingar

Spurningar:

1. Ætlar landsstýrismaðurin, at avsláttarkort hjá SSL eisini skal fevna um lærlingar og ikki einans lesandi?
2. Um so er, nær ætlar landsstýrismaðurin at seta hetta í verk?

Viðmerkingar:

Tað er umráðandi, at vit hava rættvísar avsláttarskipanir, ið kunnu hjálpa okkara ungdómi, meðan tey nema sær lærdóm.
Okkara samfelag hevur brúk fyri bæði bókliga og fakliga lærdum fólki, og tí eiga øll, ið útbúgva seg, at fáa javnbjóðis sømdir.

Vit hava eina góða avsláttarskipan til leiðirnar hjá SSL fyri lesandi.
Lærlingar eru tó ikki javnsettir við lesandi, tá umræður avsláttarskipanina.

Fyri at gera landsstýrismannin varugan við hesa avbjóðingina, sum rakar ein samfelagsbólk órættvíst, verður hesin spurningur settur.

Á Løgtingi, 22.juni 2023

Hans Jacob Thomsen